# Íverksetarahúsið í Klaksvík ger eitt gott arbeiða

**– Vit í SamViti hava ikki gjørt annað enn bjóðað Íverksetarahúsinum í Klaksvík samstarv – og vit hava einki ímóti at tey bæði íverksetarahúsini yvirtaka nakað av okkara íverksetararáðgeving, sigur Elin Heinesen, stjóri á Samviti í viðmerking til Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóra í Klaksvík**

ELIN HEINESEN
stjóri í SamViti






Eg haldi, at tað er sera spell, at Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, tekur mítt útspæl í Sosialinum týsdagin um íverksetan og íverksetararáðgeving so illa upp og kennir mínar útsagnir sum eina hóttan móti Íverksetarahúsinum í Klaksvík.

Eg dugi ikki at síggja í hvørjum "karaktermorðið", sum borgarstjórin kallar tað, á Íverksetarahúsið í Klaksvík liggur. Eg havi ikki lagt út við, at SamVit á nakran hátt skal kappast við Íverksetarahúsið í Klaksvík. Tvørturímóti. Vit í SamViti hava ikki gjørt annað enn at bjóða Íverksetarahúsinum samstarv. Vit hava enntá keypt ráðgevingartænastur frá Íverksetarahúsinum fyri eina 6-siffraða upphædd í fjør. Tað kann í mínari verð bara síggjast sum ein viðurkenning av teirra virksemi.

Vit halda nemliga, at Íverksetarahúsið í Klaksvík og Rani Nolsøe gera eitt sera gott arbeiði - og vit hava avgjørt einki ímóti at lata tey tvey verandi íverksetarahúsini í Føroyum - tvs. Íverksetarahúsið í Klaksvík og Bitland í Havn - yvirtaka nakað av okkara íverksetararáðgeving, har tey kunnu gera tað betri enn vit - og gjalda teimum fyri tað. Og tað meta vit, at tey kunnu gera betri enn vit í nógvum førum, um ikki øllum.

Vit hava ikki á nakran hátt mótarbeitt Íverksetarahúsinum í Klaksvík, men tvørturímóti heilsað teimum vælkomnum millum teir stovnar ella hús, sum longu í fleiri ártíggjundir hava fingist við íverksetararáðgeving frammanundan (Ídnaðarstovan, sum seinni bleiv til Menningarstovan, sum aftur seinni bleiv til SamVit og so Kleikingardepilin/Bitland).

Vit blanda okkum ikki í nakað sum helst, sum vit ikki eiga at blanda okkum uppí. Og vit hava ikki knappliga bara funnið upp á hetta burtur úr bláari luft. Vit fáast bara við tað, sum vit alla tíðina hava fingist við. Og sum vit hava góða serfrøði til.

Tað er klárt útstungið í Vinnupolitikkinum hjá fyrrverandi landsstýrinum fyri skjótt nógvum árum síðani, hvat leikluturin hjá SamViti skal vera í mun til íverksetararáðgeving, har íverksetan og íverksetararáðgeving stendur nevnt í trimum út av fimm punktum, sum orða endamálið við SamViti. Vit halda okkum bara til bókstavin. So tað er avgjørt einki nýtt í hesum.

Um Steinbjørn O. Jacobsen lesur Vinnupolitikkin, so kann hann finna fylgjandi orðingar um, hvat SamVit skal:

"Nýggi samanlagdi stovnurin fer at hava eitt fjøltáttað samstarv við nógvar ymsar partar so sum vinnusamskipanir, einstakar fyritøkur, íverksetarar, ymsu stjórnarráðini og stovnar teirra. Millum høvuðsuppgávurnar hjá stovninum verður:

- At birta upp undir nýskapan og íverksetan.
- Í samstarvi við aðrar myndugleikar at samskipa mannagongdir innan fyrisiting, sum hava týdning fyri íverksetarar.
- At ráðgeva um íverksetan og gera íverksetaraportal, har íverksetarar fáa svar upp á spurningar um at stovna fyritøku.
- At marknaðarføra føroyskar vørur og tænastur og Føroyar sum eitt land at gera íløgur í.
- At menna ferðavinnuna í Føroyum og at marknaðarføra Føroyar sum ferðamannaland."

So tað hevur leingi staðið púra greitt, hvat vit skulu í SamViti, inntil vit fáa annað at vita.

Vit ætla okkum sum sagt ikki at kappast við íverksetarahúsini, men meta, at tað er skilagott, at íverksetararáðgeving verður samskipað á sentralum stað. Eingin einstakur stovnur - hvørki almennur, kommunalur ella privatur - 'eigur' íverksetaraøkið eksklusivt. Eg kann bara undirstrika týdningin aftur og aftur av, at vit øll, sum vilja íverksetarum tað væl í Føroyum - antin tað eru almenn ella privat - leggja kreftirnar saman fyri at tryggja at vit útnytta alla tøka serfrøði, og at vit samskipa okkara arbeiði og samstarva til gagns fyri einkulta íverksetaran. Hesa uppgávu hava vit leingi tikið í største álvara í SamViti.

Eitt behøvist ikki at útilukka hitt, so har er eingin orsøk til at kenna seg hóttan. Eg haldi heldur ikki, tað er so væl umhugsað av borgarstjóranum í Klaksvík t.d. at siga, at allir almennir stovnar eru stirvnir - sum um teir eru tað pr. definitión - og at teir bara vilja oyðileggja eitt dynamiskt hús sum Íverksetarahúsið í Klaksvík. Tað hevur einki við okkara veruleika at gera í SamViti í øllum førum, so sum vit síggja tað. Eg kann bara heita á borgarstjóran í Klaksvík um ikki at vera so avgjørdan á so lítlum grundarlag og heldur lata ivan koma okkum til góðar. Vit ætla ikki at oyðileggja nakað sum helst, sum er gott. Tvørturímóti.

Tá alt kemur til alt, ræður tað um at prógva sítt virði. Og tað, sum prógvar besta virðið, kemur undir øllum umstøðum helst at yvirliva í longdini.

Tað góða, sum kann koma burtur úr hesum er, at vit fáa eitt seriøst kjak um hetta sera týdningarmikla mál - íverksetan og íverksetararáðgeving - hvussu gera vit tað best - saman!

# Bíblian innblást av Gudi – ikki mannaorð um Gud

**Ellivti partur**

RICHARD DANIELSEN



Í seinasta parti sóu vit tvey profeti hjá Esaiasi, um at Jesus skuldi verða føddur, og tey eru jú gingin út. Profetarnir hava profeterað mangt, sum enn ikki er gingið út. Og tað ger Esaias eisini. Til dømis kanst tú í ellivta kapitli lesa um Messias og friðarríki hansara. Esaias, eins og aðrir, profeterar fram til endans tíð, ja longur, heilt inn í ævinleikan. Bókin er verd at lesa. Hví liggur bíblian á hillini mangan, meðan vit menniskju bert takast við tað, sum er her á jørðini, tað sum varir so stutt og kann verða kvett av, hvønn dag tað skal vera. Hvi? Jú tí vit eru fallin menniskju. Esaias sigur um okkum, at vit vendu okkum hvør sín veg, burtur frá Gudi. Men Gud kallar á okkum, eisini gjøgnum Esaias, hann verður róptur evangelisturin millum profetarnar. Millum annað sigur hann hetta:

Nú, øll tit, ið tysta - komið til vøtnini! Og tit, sum ongan pening hava, komið, keypið og etið, ja, komið, keypið fyri ongan pening og gjaldsleyst vín og mjólk!

Hví lata tit pening fyri tað, sum ikki er breyð, og dagløn tykkara fyri tað, sum ikki mettar? - Lurtið eftir Mær! So skulu tit fáa gott at eta, so skal sál tykkara gleða seg í tí, sum feitt er.

Boyggið oyra tykkara og komið til Mín - hoyrið! So skal sál tykkara liva, og Eg skal gera ævigan sáttmála við tykkum, geva tykkum alla hina trúføstu náði, ið Eg havi lovað Dávidi Es.55,1-3.

Leitið til HARRAN, meðan Hann er at finna, kallið á Hann, ta stund Hann er nær!

Hin gudleysi sleppi leið síni, og hin óræTtvísi hugsanum sínum, og vendi við til HARRAN, so skal Hann miskunna honum - til Gud okkara, tí Hann skal ríkliga fyrigeva! Es. 55,6-7.

Jesus sigur einastaðni, at orðini hann talar eru andi og eru lív. Soleiðis eisini her hjá Esaiasi, her er talan um andaliga føði. Hana treingja vit menniskju til, og vit eiga at verða Harrans kalli lýðin og venda við til hansara.

Esaias profeterar eisini nógv um tjóðirnar, ja allan heimin. Tað er ikki hugnaligur lestur. Tað er øðiligt at lesa um dómin yvir hendan heim í kapitli 24. Men tað er hesum, sum Gud vil frelsa okkum undan, tí er tað, hann biður okkum koma til sín og taka við tí frelsu, hann hevur gjørt til reiðar við at geva son sín í deyðan fyri okkum. Vit skulu hyggja nærri at frelsuvegi Guds, sum kemur so greitt fram í tí kenda kapitlinum 53 . Hetta taka vit uppaftur í næsta parti.

**Framhald.**

# *Vár*

*Gróðrarbúgvin heiðasvørður boðar*
*frá spírandi lívsanda*
*sum glógvar í sólarlýðku*
*í grønkandi gørðum*
*í mógvi á lið*
*í mýrusnípu sutli*
*í gilaljóð - í stilli*
*í gullglæmdum steinum*
*í mosagrógvnu krógv*
*í látandi lógv*
*í hamranna tárum*
*- boðandi várið.*

**V. á Løgmansbø 12.2.08**